# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# B36 bjóðar KÍ av



*Oddafiskarnir verða helst teir somu, men tað tykist, sum hevur B36 spent bogan enn meira, nú tær aftur hava sett sær fyri at koppa KÍ av føroyska kvinnutindinum innan fótbólt*

**Í fjør var nær við, og við styrki úr millum øðrum KÍ ger B36 nú enn eina roynd at bjóða áttafaldu meistarunum av**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Av teimum 28 kvinnunum, sum skiftu felag, meðan flytingarvindeygað enn var opið, eru nakrar flytingar, sum kunnu benda á eina harðari kapping í oddinum.

Um hon verður nógv harðari, skulu vit tó lata vera ósagt, tí B36 var so nær við at basa KÍ, sum eingin annar hevur verið seinastu átta árini. Men tær megnaðu ikki at halda leiðsluni í Klaksvík, og so streyk KÍ enn einaferð avstað við heitinum.

Í B36 gera tær tó aftur eina roynd í ár, og til hetta er liðið eisini styrkt. Úr júst KÍ hevur B36 fingið hendur á Kristinu Eyðbjørnsdóttir og Petur Sjóstein, eins og Rakul Magnussen og Gunn S. Muller eru komnar til B36 úr ávikavist EB/Streymi og HB.

Kristina hevur í fleiri ár verið mett millum bestu føroysku spælararnar, og lítil ivi er um, at hon kann verða sannur fongur hjá B36. Og tað sama kann væl sigast um Rakul, sum fyrr er kosin sum ársins stjørnuskot í føroyskum fótbólti. Og so vóna tey í árstalsfelagnum helst, at hon kann gera sama mun, sum ein annar Magnussen gjørdi á manslioi felagsins fyri 15-20 árum síðani.

KÍ hevur hinvegin eisini fingið sær Svannu V. Nielsen og Marjun Joensen úr EB/Streymi í hópin, so tað bendir tann vegin, at tað aftur verða tey bæði somu liðini, sum fara at takast í oddinum hetta kappingarárið.

## FAKTA

Tær 18 flytingar av kvinnuligum spælarum yvir 16 ára aldur vórðu í vetur hesar:

| Spælari | Frá | Til |
|---|---|---|
| Nelly Poulsen | NSÍ | Víkingur |
| Sanna D. Fossdalsá | GÍ | B68 |
| Erna Svalbard | GÍ | B68 |
| Mai Britt Svalbard | GÍ | B68 |
| Joan Miðberg Mikkelsen | GÍ | B68 |
| Maibritt OlsenGÍ | B68 | |
| Heidi M. Í Hjøllum | ÍF | B68 |
| Heidi Olsen | NÍF | EB/S |
| Svanna V. Nielsen | EB/S | KÍ |
| Gunn Sloan Muller | HB | B36 |
| Lillian Hellisdal | Ikast | HB |
| Kristina Eyðbjørnsdóttir | KÍ | B36 |
| Petra Sjóstein | KÍ | B36 |
| Ninna K. Johansen | GÍ | Skála |
| Nancy Djurhuus | EB/S | Víking |
| Rakul V. Magnussen | EB/S | B36 |
| Marjun Joensen | EB/S | KÍ |
| Ragnhild Aas | KÍ | Elnesvågen |

# Stórsteypadysturin gagnar børnunum

**Leygardagin bresta føroyameistararnir úr NSÍ og steypavinnararnir úr EB/Streymi. Ágóðin frá dystinum fer til vælgerandi endamál**

FÓTBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Tað er Lions Club í Føroyum, sum saman við Fótbóltssambandi Føroya stendur aftan fyri Stórsteypadystin, sum er byrjanin upp á fótbóltsárið, tá føroyameistararnir og steypavinnararnir frá árinum fyri møtast í ársins fyrsta dysti.

Hesa ferð er Stórsteypadysturin millum NSÍ og EB/Streym, ið gjørdust ávikavist føroyameistarar og steypavinnarar í fjør, og dysturin verður spældur á ovara vølli í Gundadali leygardagin klokkan 15.

### Kom børnum til góðar

Herfyri var samkoma í Sjónleikarhúsinum í Havn, har tvinni gávubrøv vórðu handaõ. Upphæddin á øðrum var ágóðin frá Stórsteypadystinum í fjør, og upphæddin á hinum var ágóðin frá listaframsýningini í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.

Stórsteypadysturin í fjør var millum havnarfeløgini HB og B36, og B36 vann hann 5-1 við brotssparkskapping, eftir at tað stóð á jøvnum 1-1, tá vanliga leiktíðin var farin.

So mikið av áskoðarum var til dystin, at inntøkurnar vóru 35.000 krónur, umframt at fleiri lótu meira enn prísin fyri atgongumerkið. Fyri at røkka einum rundum tali høvdu feløgini í Lions Club latið eitt sindur aftrat, so upphæddin gjørdist 50.000 krónur.

Hesin peningur var latin verkætlanini »Tú hevur rætt«, sum Barnabati stendur fyri, og tí vóru Anna Elisabeth Iversen og Jóhanna L. Joensen frá Barnabata komnar at taka ímóti. Tað var økisformaðurin hjá Lions Club í Føroyum, Kristian Joensen, ið handaði gávubrævið, og til staðar var eisini Karl Vidtfeldt frá Fótbóltssambandinum.

Fyrsta dagin verður almannakunngjørt, hvørjum góðum endamáli peningurin frá dystinum millum NSÍ og EB/Streymi skal gagna hesa ferð.




*Frá vinstru: Kristian Joensen, økisformaður í Lions Club í Føroyum, Jóhanna L. Joensen og Anna Elisabeth Iversen frá Barnabata við gávubrævinum upp á 50.000 krónur til verkætlanina »Tú hevur rætt«, og Karl Vidtfeldt frá Fótbóltssambandi Føroya*